16.07.2020

Opið bræv til Sørvágs kommunu og Umhvørvisstovuna

Í oktober 2019 løgdu vit nakrar myndir út á okkara heimasíðu av brúktum graslíki, sum Sørvágs kommuna millum annað hevði tveitt oman á sandin. Onkur helt tá, at tað kanska kundi vera komið rekandi onkra aðra staðni frá; men tað ljóðar bæði ótrúligt og sera ósannlíkt.
Tá málið varð umrøtt í Degi & Viku, segði Umhvørvisstovan, at gamalt graslíki og granulat skuldi sendast á Brennistøðina - sjá leinkjuna
http://kvf.fo/netvarp/sv/2019/10/07/20191007graslikidrekurinatturuni

Mánadagin 06. juli 2020 fóru vit í Vágarnar at hyggja eftir blómum, og tá vóru vit eisini niðri á sandinum. Tann stóra rullan av graslíki, sum vit sóu liggja har 9 mánaðir frammanundan, var burtur; men ein onnur, sum lá við fótbóltsvøllin, liggur har enn. Parkeringsplássið er eisini enn "plastfixerað" við brúktum graslíki, sum er koyrt niður í moldina og sandin á staðnum.
Møguliga hevur Sørvágs kommuna upprunaliga hugsað um endurnýtslu; men tað kann líka so gott vera tað umvenda - at spara útreiðslurnar og stríðið av at burturbeina brúkta graslíki og granulatið.
Eitt er, at hvør bilur, sum parkerar á brúkta graslíkinum við fótbóltsvøllin, er við til at spjaða plastikk og granulat runt í náttúruna; men tað er syndarligt, eisini at skula noyðast at vassa í granulati, tá man gongur oman móti sandinum.
Man skuldi trúð, at borgarstjórin og restin av kommununi ynsktu at verja eina so vakra náttúru sum hana niðri við sandin; men man skuldi sanniliga eisini trúð, at Umhvørvisstovan fylgdi málinum, tá hon í 9 mánaðir hevur kent til dálkanina av graslíki á staðnum...?

Hvør situr við evstu ábyrgd av stóru dálkingini av brúktum graslíkisvøllum, sum verða "endurnýttir" sum best ber til úti í náttúruni kring landið?

Vinarliga

Jens-Kjeld